# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Upprudding hjá FSF

Tað er ikki í lagi, at spælarar úttala seg, sum teimum lystir. Í øllum førum fær tað avleiðingar, um farið verður út um mark við útsagnum um tað, sum er farið fram á vøllinum.

Tað er ein veruleiki, sum Fótbóltssambandið hevur sligið fast, nú Bartal Eliasen er leikbannaður í tveir dystir fyri sínar útsagnir um dómaraavrikið hjá Rúna Gaardbo í dystinum millum NSÍ og ÍF.

At krevja eitt minstamark fyri fólkasið er væl eisini upp á sítt pláss. Serstakliga tá hugsað verður um, at spælararnir í fremstu deildunum eisini eru fyrimyndir hjá yngru ættarliðnum av fótbóltsspælarum.

Men í nógvar mátar skapar úrskurðurin fleiri spurningar, sum í besta føri geva FSF ein forkláringstrupulleika.

Longu í mai mánaði í fjør varð staðfest, at spælarar, venjarar og onnur, sum sýna ósømiligan atburð skulu vanliga hava leikbann. Skulu er ikki tað sama sum kunnu, og tí hevur FSF ein forkláringstrupulleika, tá hetta ikki hevur verið praktiserað í fjør. Sum tað framgongur í blaðnum í dag, so hava í øllum førum verið fleiri høvi, har tað vildi verið meira upplagt enn hesaferð, at spælarar ella venjarar vórðu leikbannaðir. Og tað fremur ikki rættartrygdina hjá spælarunum, um ein higar til ónýtt paragraff brádliga verður togað fram og sett í gildi. Ella kanska verða krøvini til Kappingarnevndin um at lurta, lesa og hyggja eftir fjølmiðlafrásagnunum nú tað størri.

Og annar spurningur er gradueringin av revsingini. Kappingarnevndin hevur heimild at geva leikbann í ein til tríggjar dystir. Kanska er bannið til Bartal gylti millumvegurin í so máta, men nakrar av útsagnunum í fjør vóru munandi harðari, tí tær eru beinleiðis álop á integritetin hjá dómaranum. Verandi lógarverk gevur bert heimild at revsa upp til tríggjar dagar fyri hesar útsagnir, og so má revsingin setast í mun til hetta.

**Sosialurin**

## Rak statsministarin Jacob Vestergaard úr landsstýrinum

**ÓLAVUR PETERSEN**

Á hugnaligu og hugaligu heimasíðuni hjá Jóanisi Nielsen stóð um dagarnar, at SeaWave hvørki verður stuðlað av EU ella Føroya Landstýri.

Mín vreiði í sambandi við grein í Dimmu frá 19. oktobur 2007: "Jacob Vestergaard pyntar upp á veruleikan", kyknaði av nýggjum.

Hví vreiði? Tí her hevði Dimma og samlaða pressan ein upplagdan møguleika at fara í dýpdina av málinum, hvussu fólki aftan fyri SeaWave hava mannererað, manupolerað og ført stovnar og feløg og stjórnir bak ljósið.

Dimma umtalar 19. oktober 2007 brævaskifti millum føroyska innlendismálaráðið (Jacob Vestergaard) og danska umhvørvismálaráðið (Connie Hedegaard), um at alduorkuverkið SeaWave á Trælanýpuni kemur at standa klárt í 2010 at veita interkommunala felagskapinum SEV streym.

Hetta vildi, var tað ikki slutur og vrøvl, sett Føroyar á heimskortið for ever, tí henda heimssensatiónin hevði ført við sær, at oljuprísurin við einum braki var fallin úr 120 USdollarum fyri tunnina niður í 10 dollarar, tí í staðin fyri olju og gassleiðningar so vórðu elleiðningar við hákapaciteti lagdir kring knøttin allan, frá verkum sum transformera veldugu kreftirnar í havinum til ravmagn.

SeaWav er onga leið komin at fara í holt við naka alduorkuverk.

Veruleikin er tann, at granskarar á økinum hava sligið seg saman í alheims felagsskapir og hava bundið seg til at geva hvørjum øðrum informatiónir um hvørt nikk og prikk á granskingarleiðini. Nógar vísindagreinar samarbeiða og tann best vardi databankin er á hesum øki.

Øll bíða vit í spenningi, um og nær komið verður á mál. Verður einki úrslit, so má mannaættin uttan iva fara frá "modernaða lívsstílinum".

Allastaðni eru hálvir og heilir bandittar, men munurin er, at í Føroyum gevur pressan teimum frítt at fara.

Brævaskiftið millum Jacob Vestergaard og Connie Hedegaard hevur av álvara sett spurnartekin við politisku umsitingarligu støðuna í Føroyum, bæði á Christiansborg og í Bruxelles.

Man Anders Fogh Rasmussen, statsministari, og Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, ikki hava álagt Jóannesi Ejdesgaard, løgmanni og táverandi landsstýrismanni í uttanríkismálum, um í stundini at steðga Jacob Vestergaard.

So starvssetannarmálið á Strandferðsluni var bert eitt hent høvi at seta hann frá sum landsstýrismann.

## Kommunusamanlegging og fólkaræði

**SIGURÐ S. SIMONSEN**
borgarstjóri



Kommunusamanlegging hevur verið nógv umrøtt evni nú í nøkur ár. Stundum meir og stundum minni.

Tað, sum hevur eyðkent kjakið, er, at tað ikki einans er effektiviseringstankin einsamallur, ið eigur at fyrihalda seg til, tá ið umræður fólkarættsligar spurningar, men í størri mun tær fólkarættsligu grundreglurnar.

Úrslitið av hesum varð, at løgtingið samtykti lógina um sjálvbodna kommunusamanlegging.

Jú, tað hava eisini verið røddir frammi frá ávísum landspolitikkarum um tvang og tvingsil og hóttanir um við lóg at fremja teirra vilja.

Men tøkk fái okkara háttvirda løgting fyri, at teir kendu sína fólkaræðisligu vitjanartíð. Allar tær umleið 15 kommunusamanleggingarnar, ið eru framdar higartil, hava bygt á hesa somu fólkaræðisligu meginreglu.

Í øllum teimum kommununum við einum undantaki, har tað hevur verið upp á tal at avtaka kommununa, hevur hesin spurningur verið lagdur til fólkaatkvøðu. Fólksins vilji hevur verið fylgdur í øllum hesum førunum.

Tað sigur seg sjálvt, at fólkini í hvørjari kommunu sør vita best, hvat er best fyri tey og ikki nakar annar. Tað sjónarmiðið mugu vit øll hava virðing fyri.

Lat ongan verða í iva um rættin hjá borgarum í Føroyum at taka seg saman í ein felagsskap, ið eitur ein komuna. "Danmarks Riges Grundlov" og løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunur (kommunustýrislógin) gevur fólki henda rættin.

Tí er einki meira rímiligt og rætt, at stingur tann spurningurin seg upp í eini kommunu um at avtaka seg sjálva, so eigur hetta at verða lagt út til borgarar í kommununi at avgera, og tann avgerðin eigur at verða tikin til eftirtektar av óansæð.

Guð náði ta yvirvøld, ið gongur lætt um fólkaræði og letur seg freista í eini strongdari støðu at skúgva borgarans vilja til síðis og loypa uppum, har garðurin er lægstur. Tað fer sum frálíður at hevna seg aftur so ella so.

Sum sagt, so hava tær kommunur, ið hava avtikið seg sjálva, lagt saman við aðrar ella hava stovnsett nýggja kommunu, havt møguleikan at havt fólkaatkvøðu um henda sera álvarsama og týdningarmikla spurning.

Tí kann tað ikki verða annað enn rímiligt og rætt enn, at allar hinar kommunurnar eisini fáa henda sama møguleika, sjálvar at avgera sína lagnu og framtíðar kommunubygnað.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.